


Fráboðanir, sum ynskjast undir Innanoyggja-teigin, skulu vera blaðnum skrivliga í hendi í seinasta lagi kl. 10 dagin fyri, blaðið kemur út. Eru tað merkisdagar sum tygum ikki ynskja skulu koma við, kunnu tygum sjálvi siga okkum frá. Merkið brævbjálvan Tíðindi Innanoyggja og sendið hann í góðari tíð til Dimmalætting, Box 19, FR-110 Tórshavn ella fax nr. 10941. Í brævinum má týðuliga tilskilast, hvønn dag fráboðanin skal í blaðið. Við tað at hesi tíðindi koma í blaðið ókeypis, tekur Dimmalætting ikki ábyrgd av møguligum villum.

**Gudstænastur**
*5. sunnudag eftir trinitatis*
**Hvalvík** kl. 11,
Martin Restorff Jacobsen
**Kollafjørður** kl. 11,
Jacob Magnussen
**Haldarsvík** kl. 11
altargangur Uni Næs.
*Í Hósvík, Hvalvík, Haldarsvík og Tjørnuvík gongur talvan fyri Føroysku Sjómansmissiónina.*
**Skála** kl. 11,
Petur Martin Rasmussen.
**Sjóvar** kirkja kl. 11,
Jógvan Friðriksson.
**Fríðrikskirkjan** kl. 11,
Jákup Kass.
**Christianskirkjan** kl. 11,
lestur.
**Húsar** kl. 12,
Hans J. Joensen biskupur, altargangur v. Niels Paula Danielsen og Henning Bøgesvang.
**Viðareiði** kl. 11, altarg.
Erland Beder.
**Vesturkirkjan**
Høgni Poulsen.
**Norðradalur** kl. 12,
Kjartan Mørkøre.
**Hvalba** kl. 12 altargangur,
Paul Paulsen og stud. theol
Marjun Lómaklett.
**Havnar kirkja**
Bjarni Bæk.
*Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina*
**Nólsoy,** altargangur
Sonja Klein.
*Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina*
**Porkeri** kl. 12, altarg.
Hartvig Poulsen.
*Innsavnan til Føroysku Sjómansmissiónina.*
**Gjógv** kl. 12 altargangur,
Emil Olsen.
*Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Sjómansmissiónina.*

*Fuglafjarðar prestagjald.* Innsavnan til Føroysku Sjómansmissiónina

*Vága prestagjald.* Talvan gongur í øllum kirkjum fyri Føroysku Sjómansmissiónina.

**Morgunlestrar í Útvarpinum** 17.-22. juli Johannes Álvheygg í Havn lesur.

Mánadagin:
nr. 323 »O, kristni tú alt«
1. Kor. 13,13

Týsdagin:
nr. 478 »Vár trúgv várt fasta álit er«
Hebr. 11,1

Mikudagin:
nr. 494 »Eg vóna vil í hvussu fer«
Róm. 8,24

Hósdagin:
nr. 521 »Hvør føgur skal Guðs kirkja stá«
1. Kor. 13,8

Fríggjadagin:
nr. 462 »So víða um lond sum sólin hon sær«
Fyrra Tim. 1,15

Leygardagin:
nr. 50 »Óttast ei, um mangan stígur«
Fyrra Tim. 15-16.

## SUÐURSTREYMOY

**AA-fundur** í Havn er fríggjakvøld kl. 20 í Tórsgøtu 5 og kl. 22.30 í Uppistovu, C. Pløyensgøtu.

**Adventkirkjan,** Tórshavn. Í morgin kl. 11 bíbliugransking v. Aase Olsen

**Aqua Vitae,** Bøkjarabrekka. Telefonandaktin 11986.

**Blákrossstovan,** Kongagøta er opin mándag-fríggjadag kl. 10-12 og 14-17.

**Evangeliihúsið,** Tróndargøta. Í kvøld kl. 20.30 ungdómsmøti. Sunnudagin møti kl. 11 og kl. 18. Telefonandaktin 12266. Barnatelefonandaktin 19934.

**Felagsskrivstovan hjá Fráhaldsrørsluni.** Í Juli mánað er skrivstovan ikki regluliga opin. Hava tygum átrokandi ørindi ring 41168

**Felagið Tórshavn. - útferð.** Leygardagin 15. juli verður ein náttartúrur: Vestmanna-Bjarnadal-Mýrarnar-Kvívík. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 22. Havið góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Filadelfia,** Landavegur 22. Leygardagin kl. 17 landsbøn, sunnudagin kl. 11 morgungudstænasta, kl. 19 møti.

**Føroya Filatelistfelag** opið fyri øll leygardagin kl. 10-14 og sunnudagin kl. 15-17 í »Tekniska skúla«, Tórsgøtu 21.

**Frelsunarherurin,** Tórshavn. Leygardagin útimøti kl. 11 um viðrar. Sunnudagin møti kl. 11 Hans Hansen talar, kl. 18 møti Sofus Steingrund talar. Inger Hansen leiðir

**Missiónshúsið** við Landavegin. Sunnukvøldið møti kl. 19 v. Jónhard Johansen.

**Pro Vita** (fyri lív). Áðrenn tú velur fosturtøku tosa við ráðgevarar okkara Petra Henriksen, tlf. 57795; Asloug Vika Petersen, tlf. 41404; Erna Háberg, tlf. 16350; Kristianna Hansen, tlf. 33383, Kathrin Mortensen, tlf. 71791.

**Rhema,** Tórshavn. Leygarmorgunin kl. 10 útimøti í Gongugøtuni v/ Sparikassan. Sunnudagin morgunmøti kl. 10.30 v.Fríðtór Debes. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti. Mikukvøldið kl. 20 møti. Øll kunnu vera við.

**Veðurtænastan** á Veðurstøðini. Upplýsingar um veðrið á veðurstøðunum, kunnu fáast við at ringja á tlf. 12210.

## NORÐSTREYMOY

**Missiónshúsið,** Hvalvík. Sunnudagin møti kl. 19 v. Jonnu Joensen, Hvalvík.

**Nardus.** Telefonandaktin er at hoyra á tlf. 21360.

## EYSTUROY

**Forbønartænastan Shalom** í Kelduni í Skálafirði, tlf. 41677 hvønn fríggjadag kl. 21-24.

**Keldan,** Skálafirði. Leygardagin verður Opið hús í Kelduni kl. 21. Gospelbólkurin Ja-Asanja og Lisa verða við. Sunnudagin møti kl. 20 v. Elsbert Jacobsen.

**Missiónshúsið,** Toftir. Í kvøld kl. 20 verður sangkonsert við danska kórinum »Kainos«.

**Lívsins Orð.** Møti sunnudagin kl. 10.30.

## SANDOY

**Betania,** Skopun. Telefonandaktin 61707.

**Missiónshúsið,** Skopun. Í kvøld kl. 20 lovprísningsmøti.

**Zion,** Sandur. Telefonandaktin 61707.

# UNI NÆS PRÆDIKAR Á ÓLAVSØKU



Ólavsøkudagur 29. juli er í ár leygardagur. Henda dagin fara løgtingsmenn, landsstýrismenn, løgmaður, prestar og aðrir embætismenn í skrúðgongu til gudstænastu í Havnar kirkju. Uni Næs prestur í Vestmanna prædikar. Í fjør prædikaði Heri Joensen prestur í Vági á ólavsøku.



## SUÐUROY

**Missiónshúsið,** Sumba. Møti leygarkvøldið kl. 20 v. Hjørleif Poulsen, trúb.

**Missiónshúsið,** Vági. Møti sunnudagin kl. 18 v. Hjørleif Poulsen, trúb.

**Missiónshúsið,** Tvøroyri. Møti sunnudagin kl. 18.

**Vágs kirkja.** Konsert verður mánakvøldið 17. juli kl. 20 við danska kamarkórinum »Kainos«

## UTTANLANDS

**Eliaskirkjan,** Vesterbrogade 49, København. Í summar verða fundir annanhvønn leygardag kl. 19, tann 15. juli, 29. juli og 12. august. Bussarnir 1, 6, 16, 28 og 41 steðga nærhendis. Lýst verður tá sunnudagsskúlin byrjar aftur í august.
Tlf. 32886727/36789046

**"Malta",** Vinkelvej 2, Hirtshals. Sunnudag kl. 11 morgunmøti, kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 19 evang. møti. Mikudag kl. 20 uppbygging og bønarmøti.
Tlf. (098) 94 43 70.

**Kristnastova,** Birmavej 36, 2300 København S. Tlf. 031 5518 09 - fax 031 586149. Vegna umbygging í húsinum vera eingir fundir í Kristnastovu í Juli mánaði. Tó ber til at ringja til starvsfólkið í húsinum.

**Samuelskirkjan,** Thorsgade 65. Sunnudagin 16. juli kl. 14 verður gudstænasta við altargangi v. Peter Andru Petersen - aftaná verður drekkamuður at fáa í Kryptuni.

## MERKISDAGAR

**Brúdleyp.** Leygardagin 15. juli kl. 16 giftast í Kirkjubøar kirkju Gry Patursson, Stavanger og Eli Høgnesen, Argir. Br. adr.: Róðrarneystið, Argir.

**75 ár.** Í dag verður Jóhan A. Petersen, Norðdepli (búsitandi Storkehavevej 4 H 5884 Gudme, Fyn) 75 ár.

# Seismiskar kanningar gerast úr luftini

**Landsstýrið hevur givið einari avstralskari fyritøku loyvi til at gera serligar seismiskar kanningar av føroysku undirgrundini. Kanningarnar verða gjørdar við flogfari.**

Avstralska fyritøkan World Geoscience Corporation Limited hevur fingið loyvi at gera seismiskar kanningar av undirgrundini.

Dóttirfelagið hjá avstralska felagnum í Bretlandi World Geoscience UK skipar fyri kanningunum, sum verða gjørdar úr luftini. Talan er um magnetiskar kanningar og um sonevndar ALF kanningar, sum avdúka, um oljuúrdráttir leka úr undirgrundini.

Kanningarnar skulu gerast innan 31. desember næsta ár.

Hetta er triðja loyvið, sum er givið til seismiskar kanningar av føroysku undirgrundini. Eingin annar fær loyvi at gera somu kanningar, sum World Geoscience UK fer undir.

Loyvisgjaldið er 100.000 krónur.

# Sjeikurin hjá Donnu í Tivoli



**Seinasta stjørnuskotið í sjónvarpsraðsendingini Beverly Hills, Jamie Walters, vitjaði Danmark herfyri. Hann var sær ein túr í Tivoli, har myndamaður Dimmalættingar hitti hann.**

Sjónvarpsraðsendingin Beverly Hills hevur tikið tey ungu á bóli, eisini her í Føroyum. Hvørja viku sita milliónir av ungum fólki og hava samkenslu við Dylan, banna og blóta yvir Valerie og eru við at spýggja av at hoyra og síggja hvussu góður og moralskur Brandon er.

Nýggjasta stjørnuskotið í hesi raðsending eitur Jamie Walters, ella Ray Pruitt, sum hann eitur í sjálvari raðsendingini. Hann spælir sjeikurin hjá Donnu - ein komandi rokkstjørna.

Jamie Walters setti tað treyt fyri at leika við í Beverly Hills, at hann skuldi spæla ein komandi rokkstjørna. Í veruleikanum hevur tað eisini gingið væl hjá honum innan tónleikin. Hann hevur fyri kortum givið út eina plátu, og hann hevur havt okkurt hit av hesi plátu.

Herfyri var hann í Danmark fyri at reklamera fyri plátuni. Hann gekk sær eisini ein túr í Tivoli, har myndamaður Dimmalættingar rendi seg í hann og tók hesa myndina av honum. Tað er Jamie Walters tl vinstru.

# NÁTTÚRA OG VIRKSEMI

*Orð/foto PHJ*



Fyri 5 árum síðani fingu vit vitjan av bretska marinuskipinum »Brilliant«. Her á myndini er tað við at leggja at bryggju.

# Bygdastevna í Sumba

Um vikuskiftið skipar Sumbiar Ítróttarfelag fyri bygdastevnu í Sumba. Byrjað verður fríggjakvøld við 2 fótbóltsdystum og barnadansur verður í samkomuhúsinum frá 21.00 til 24.00.

Leygardagin kl. 14.00 setir Johan Lisberg stevnuna, síðan verða 2 skemtidystir, har ávikavist smádreingir og smágentur spæla ímóti pápum og mammum, síðan verða ymisk tiltøk s.s. brotssparkskapping fyri børn, plettskotkapping fyri vaksin, ponyríðing, fiskidammur, bóltkast, framsýning av myndum og ymiskum heimagjørdum handverki og leygarkvøldið endar við túnadansi um viðrar, ella verður dansurin í Samkomuhúsinum.

Sunnudagin verður steypadystur ímillum Sumba/VB og TB 1. deild menn, ymiskt undirhald í hálvleikinum, síðan verður brotssparkskapping fyri vaksin, køkutombola, fiskidammur, bóltkast og framsýning og sunnukvøldið endar við góðum stevnubingo kl. 19.00 í Samkomuhúsinum, ½ krov til 2. hvørt bingo o.m.a.

Heiðursmerkir verða latin til vinnarar av dystunum, sigur Sumbiar Ítróttarfelag í tíðindaskrivi.

Skráin stendur aðrastaðni í blaðnum.

# Summarskeið á Sandi

Ofta hevur verið tosað um summarskeið av ymiskum slagi, og nú verður skipað fyri slíkum á Sandi.

Í summar frá 18. til 26. juli (báðir dagar íroknaðir) er ætlanin at hava skeið í PLANTULITING og PAPPÍRSSTOYPING. Súsan í Jákupsstovu lærari á Sandoyar Kvøldskúla skipar fyri skeiðunum.

**Plantulitingarskeiðið**
Innihaldið er:
1. Plantsavnan: hvørjar plantur eru góðar litingarplantur? og hvussu skulu litingarplantur savnast?. Tey, ið hava áhuga fyri blómum, læra eisini nøvnini á øðrum blómum og grøsum og fáa sjálvandi høvi at ganga túrar í náttúruni.
2: Ull: Hvat er ull? og hvussu skal hon hagreiðast og viðgerast?
3. Liting: Beising og liting. Høvi verður at læra at pressa blómur og at tekna blómur og mynstur úr blómum og grøsum.

Eisini fer at bera til hjá serliga áhugaðum at siggja, hvussu ymiskt kann gerast úr ull.

**Pappírsskeiðið**
Innihaldið er:
1. At stoypa endurnýtslupappír.
2. At stoypa plantur inn í pappír,
3. At læra at gera pappír úr grasi og blómum. Høvið verður eisini til at nýta pappírið til eskjur, postkort o. a. mangt - mála, forma og klippa, líma pappír.

Súsan í Jákupsstovu sigur í tíðindaskrivi, at ætlanin er, at fólk tekna seg til annað skeiðið ella bæði, og at tey, ið hava hug til tess, fáa verið verandi vikuskiftið 22. og 23. til at arbeiða sjálvstøðugt - ella ferðast í Sandoynni.

Fólkið ið ikki býr í Sandoynni, ella teimum, ið ikki sjálvi skaffa sær hús, ber til at hjálpa við innivist.

Nøkur pláss eru enn eftir. Sí annars lýsing aðrastaðni í blaðnum.

## VIKING LOTTO

**Lotto tølini** fyri viku 28:
Vinnaratøl: 6 13 24 33 36 40
Eykatøl: 11 26 29

| | |
|---|---|
| 6 tøl røtt | 3.110.123 kr. |
| 5 tøl røtt + 1 eykatal | 74.821 kr. |
| 5 tøl røtt | 7.282 kr. |
| 4 tøl røtt | 176 kr. |
| 3 tøl røtt + minst 1 eykatal | 53 kr. |

Dimmalætting tekur onga ábyrgd fyri møguligum villum.

## DANMARKS RADIO

**Fredag**

| | |
|---|---|
| 11.02 | Radioavis |
| 11.30 | Sprogminuttet |
| 11.30 | Sommerens vandveje |
| 11.55 | Det sker på P1 |
| 12.00 | Café |
| 1.10 | Honning |
| 1.30 | Kvinder i øst |
| 2.00 | En flugt rundt om jorden |
| 3.00 | Kunsten at ryge en cigar |
| 3.55 | Miljørapporten |
| 4.00 | Radioavis |
| 4.15 | Orientering |
| 5.15 | Markedspladsen |
| 5.25 | Nyheder fra Grønland |
| 5.30 | Radioavis |
| 5.50 | Sprogminuttet |
| 5.52 | Sommerens vandveje |
| 6.15 | Harddisken |
| 7.15 | Verdensmagasinet |
| 9.00 | 20 spørgsmål til folket |
| 10.00 | Radioavis |
| 10.15 | Dannelsens etik og viden |

Herefter fælles med P3

## Hini gjaldoyruni

13. juli 1995

| | | |
|---|---|---|
| New York | USD | 548,25 |
| London | GBP | 872,24 |
| Frankfurt | DEM | 389,70 |
| Stockholm | SEK | 76,02 |
| Oslo | NOK | 87,83 |
| Paris | FRF | 111,97 |
| Bruxelles | BFR | 18,969 |
| Zürich | CHF | 467,92 |
| Amsterdam | NLG | 347,96 |
| Roma | ITL | 0,3396 |
| Helsinki | FIM | 127,54 |
| Reykjavík | ISK | 9,62 |
| Wien | ATS | 55,452 |
| Madrid | ESP | 4,567 |
| Lissabon | PTE | 3,713 |
| Montreal | CAD | 405,16 |
| Athen | GDR | 2,431 |
| Tokyo | JPY | 6,2226 |
| Dublin | IEP | 895,35 |
| Ecu | ECU | 722,68 |

Kelda: Føroya Banki